

# Sólvá G. Olsen framsýning í Keypmannahavn

Sunnudagin 14. septemer kl. 14 – 17 hevur listakvinnan Sólvá Gunnarsson Olsen fernisering í Det Færøske Hus í Keypmannahavn.

Sólvá Gunnarsson Olsen er ættað úr Havn og er búsitandi í Esbjerg. Hon hevur luttikið á fleiri framsýningum í Danmark og eisini í Føroyum.

Framsýningin verður opin til 16. oktober 2008, mánadag-fríggjadag frá kl. 14 - 18.

Adressan er Vesterbrogade 17A, København V.

# Minningarorð um Turið S. Olsen

Ikki varð tað okkum, tá vit vóru í 19 ára føðingardegi hjá tær tann 6. august, at tú einans tíggju dagar seinni, ikki skuldi vera millum okkum longur. Tað, at so nógv fólk vóru samlað á tínum føðingardegi, sigur ikki lítið um, hvussu avhildin tú var.

Aftaná ein langan dag við nógvum vitjandi, var tað deiligt hjá tær at sleppa upp í føvningin hjá babba, ið gav tær leskiligan føðingardagsdøgurða, sum mamma hevði gjørt.

Ígjøgnum títt stutta lív var tú bundin av tínum koyristóli og tí tørvaði tær hjálp alt samdøgurði. Fyri at lætta um hjá foreldrum tínum, fekk tú stuðulshjálp og á hendan hátt fingu vit tað gleði at kenna teg.

Eftir førimuni royndu vit, at gera tín gerandisdag so innihaldsríkan sum møguligt. Hóast títt brek, vísti tú stríðsvilja sum fáur. Tú kundi gleðast um ting, ið tí vanliga taka sum eina sjálvfylgju. Tú lærdi okkum at síggja lívsins virðir við øðrum eygum. Tað hevur neyvan altíð verið stuttligt, at havt okkum heima hjá tykkum. Hóast tað, hava vit altíð følt okkum vælkomnar.



Abbabeiggi tín, Olaf, segði tað so væl, tá ið tú fyri seinastu ferð, kom heim til Søldarfjarðar, at tú nú endiliga var sloppin úr tínum neyðarsliga likami, og kann veruliga vísa, hvør tú ert.

Vakrari jarðarferð hevði tú ikki kunnað fingið. Ein sera stór mannfjøld var komin at vísa tær tann seinasta heiður, Turið. Orð eru fátøk í slíkari støðu, men prestur segði alt so væl. Hóast stutt skoðsbráð, megnaðu Jens Marni og Kim við vakra sanginum, sum var yrktur til Turið, saman við Vox, at seta dám á jarðarferðina.

Niðan fyri endurgeva vit sang, sum upprunaliga var yrktur til lítlan drong, ið varð nívdur av líknandi breki. Vit halda, at hesin sangur eisini so væl hóskar til tín, elskaða Turið:

*Lítla lívið, bjarta blóma,*
*gleði inn um hurðar bar.*
*Ikki kundu vit hóma,*
*at tú ikki fullment var.*
*Lítla lívið, stóra gleði, mentist*
*smílið tú oss gav.*
*Men ein dag sum ongin vardi,*
*sjúkan trein um hurðarstav.*

*Eftir hetta, - lítla skinnið, -*
*svárt eitt lív tú hevur havt.*
*Alt tú ber við tolnum sinni,*
*fær ei heldur væl sagt.*

*Lítla hjarta – meir ei orkar,*
*lívið fjarar burt úr verð.*
*Og tú stríðist enn sum áður,*
*tó at tað mót enda ber.*

*Men tað er, sum – okkar skattur-,*
*boð tú vilt oss bera nú.*
*Grátið ei – eg vakni aftur,*
*so frísk í Guðs himnabú.*

*Grát ei mamma. Pápi, systkin,*
*omma, abbi og tit øll.*
*Tí eg eri ferðabúgvin,*
*- trína inn í himnahøll.*

*Har ei neyð er – ongin pína,*
*lættan vil eg stíga har.*
*Sælan frið og góða hvílu,*
*Jesus- pápin gevur mær.*

*Frísk eg nú hjá Jesus bíði,*
*fylgið honum til hin dag.*
*Tá tit innar til Hann stíga,*
*og vit samlast øll har glað.*

Vit fara allar at sakna teg Turið, men størstur er saknurin hjá tykkum Sonja og Jonhard, Pidda og Oddny, Rebekku og Tóru. Má Harrin styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.

Vit vilja við hesum lýsa frið yvir minnið okkara elskaðu Turið.

**Stuðlarnir**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lina Hansen**, vanliga nevnd Lina í Ánunum, andaðist á Norðoyar Ellis- og Vistarheimi leygardagin 6. september, 93 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týskvøldið klokkan 18 heim í Betesda. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Linu kunnu lata Norðoyar Ellis- og Vistarheimi eina gávu, konta í peningastovunum

**Dagurin**
**10. september. Burchhardt**, deyður umleið ár 754. Munkur úr Wessex í Onglandi. Hann fór seinni sum trúboðari til Galliu og endaði sum biskupur í Würtzburg í Týsklandi.

# Kvinnustevnustevna í Zarepta

TÍÐINDASKRIV




Meira enn 100 kvinnur standa á bíðilista til kvinnustevnuna, sum verður í Zarepta komandi vikuskifti. Fyriskipararnir heita á tær kvinnur, sum møguliga ikki kunnu koma, um at geva avboð sum skjótast.

Umleið 380 kvinnur hava teknað seg til kvinnustevnuna, sum aftur í ár verður skipað fyri í Zarepta í Vatnsoyrum. Men tíverri er ikki pláss fyri øllum og standa 116 kvinnur á bíðilista.

Zarepta hevur bert seingjarpláss fyri 250 kvinnum. Tó sleppa einar 20 til aftrat, sum gista aðrastaðni ella koyra ímillum

Fyriskipararnir heita tí á tær, sum møguliga ikki kunnu koma, um at siga frá sum skjótast á telefon 332140 ella 282140, so aðrar kunnu sleppa til.

Stevnan byrjar við nátturða fríggjakvøldið klokkan 19.30 og endar við døgurða sunnudagin klokkan 12.00.

Bussar koyra av Sandinum í Klaksvík kl.17.30. Úr Berøa í Runavík kl. 17.45 og av Farstøðini í Havn kl. 18.00. Bussarnir steðga á vanligu støðunum.

- Tað hevði verið gott, um fleiri nýttu bussarnar, tí ilt verður at finna parkeringspláss, um allar taka egnan bil við vestur, siga fyriskipararnir.

Yvirskriftin fyri kvinnustevnuna í Zarepta komandi vikuskifti er "Fyri at gleði tykkara kann verða fullkomin". Orðini eru orð Jesusar úr Jóhannes kapittul 15, vers 11:

Tað verða fyri tað mesta kvinnur, ið koma at hava orðið, tó verður eisini onkur maður millum talararnar, siga Kirstin Samuelsen og John í Skemmuni í tíðindaskrivi frá Zarepta

veitst tú ikki tað?
Sosialurin